# Til Doru Nielsen á føðingardegi hennara



**Góða omma**

Síðani tú fylti 90 ár í fjør, havi eg mangan hugsað um, at næstu ferð tú fyllir, fari eg at bera tær eina heilsu, tí eg havi so nógv at takka tær fyri.

Tú hevur altíð havt og hevur framvegis eitt opið heim, sum vit altíð hava verið vælkomin í. Gestablídni trýtur ikki. Sjálvt nú tú verður 91 ár, tekur tú við einum smíli ímóti langommubørnunum, sum renna út og inn hjá tær dagliga. Tað er aldri ov lívligt ella ov nógvur gangur rundan um teg. Tú hevur tó sjálv skemtiliga sagt, at tú hevur tann fyrimunin, at tú kanst skrúva hoyritólið fyri, um larmurin gerst alt ov nógvur.

Tú hevur altíð verið sera tolin við ommu- og langommubørnini. Vit sluppu at "hjálpa" tær í handlinum, hóast hetta kanska eisini mangan gjørdist spæl.

Kærleiki tín til familjuna er stórur. Tú minnist hvønn føðingardag hjá ommu- og langommubørnunum, og munur verður ikki gjørdur á føðingardagsgávunum til børnini.

Vit minnast við gleði aftur á 90 ára føðingardagin í fjør, tá tú bjóðaði allari familjuni, tilsamans 73 fólk, til Selatraðar eitt vikuskifti. Hetta gjørdust ógloymandi dagar, sum vit við takksemi minnast aftur á. Tað eru ongar smáligheitir, tá tú hugsar um onnur.

Hvør er tað gott, at tú í ungdómsárunum gavst títt lív til Jesus Kristus. Tað hevur longu fingið ævigan týdning fyri eftirkomararnar, at tú og abbi valdu hesa leið, tí harvið eru vit eisini komin at kenna frelsuvegin. Tað er so gott hjá okkum, sum standa tær nær at vita, at tú hvílir trygt í Jesu ørmum og kanst gleða teg at koma til tað himmalska heimið.

At enda vil eg ynskja tær hjartaliga tillukku við 91 ára føðingardegnum og Harrans signing í komandi tíðum.

**Heilsan**
**ommudóttirin Durita**

# Minningarorð um Herborg Petersen

## 21.08.1910 - 17.08.2002



Svárt kennist tað, tá ið deyðin ger skilna okkara millum. Saknurin nívir, nú omma ikki er millum okkara longur.

Leygardagin 17.august 2002 andaðist Herborg Petersen - 91 ára gomul á Lágargarði. Omma var ættað úr Skopun - í Búri, og foreldur hennara vóru Magdalena og Jens Marius Poulsen. Hon vaks upp í Skopun saman við systrunum, Tove, Kinne, Fíu, Brynhild, Sigrid og bróðrinum Kristoffuri. Einans Kristoffur og Sigrid eru eftir á lívi í dag.

20 ára gomul giftist hon við Sigmund Petersen, listamálara, og settu tey búgv í Havn í 1939. Saman fingu tey 4 børn - Noomi, Vígdis, Bibi og Carlo.

Omma var eitt satt lívsstykki. Hon var ógvuliga fyrikomandi og blíð, tá vit ommubørnini komu inn á gólvið í Sílagøtu. Hon var glað fyri at fáa vitjan, og tað sum vekir serlig minni var hennara gestablídni og so tey heimabakaðu skopunarvinabreyðini, ið hon plagdi geva okkum. Hon var eisini góð við djór - hon átti bæði kettu og hund. Ja, hjá ommu var altíð gott at vera - eitt heim sum tað eigur at vera hjá eini ommu - við hjartarúmi og blíðskapi. Eitt heim, við málningum hjá abba okkara, Sigmund Petersen, sum sýndi náttúruna á ein so vakran hátt, sum fáur listamaður kann lýsa. Hennara skemtingarsomu - og til stundir heldur rámandi viðmerkingar til tað, sum vit onnur umrøddu, var tað, sum í mínum eygum eyðkendi ommu. Hon dugdi ótrúgliga væl at siga frá hendingum í hennara lívi, var hittinorðað og hevði ofta sína meining um dagligu viðurskiftini hjá okkum ommubørnum. Eisini var hon kreativ og dugdi væl at spæla klaver. Omma var fastur kirkjugangari, og seinastu árini fylgdi hon við í gudstænastu í útvarpi og sjónvarpi, tí áhugin til kirkjuna var ein nátturligur partur av hennara trúgvandi lívi.

Seinastu 5 árini hevur omma búð á Lágargarði, og hevur hetta verið karmur um hennara lív. Har treivst hon sera væl og segði okkum, at starvsfólkið gav henni 'góðanátt koss' hvørt kvøld áðrenn hon legði seg, so tað føldist sum at vera heima. Her minnist eg stundum tær sangløtur, ið vóru fyri íbúðarfólkunum á Lágargarði, og vóru hetta hugnaligar løtur vit høvdu saman við ommu. Síðan omma var farin um tey 90 árini, var minni hennara av álvara farið at bila, og gav hetta sjálvandi munandi broytingar í hennara verimáta. Til tíðir gramdi hon seg um at heimið var blivið ov stórt at halda reint.

Tað má sigast, at omma hevur verið ein av teimum hepnu at hava búð tey seinastu árini á Lágargarði. Stóra tøkk havi tit fyri tað, og eisini ein stór tøkk fyri stuðulin í sambandi við jarðarferðina hjá ommu. Eisini ein hjartans tøkk til Sonju Klein, prest fyri tey vøkru orð undir jarðarferðini. Takk fyri øll somul.

Við hesum fari eg at lýsa frið yvir minnið um ommu mína, Herborg Petersen.

**Boði**

# Hjálpið Amina Lawal

**DEYÐADÓMUR**
*Tíðindi frá Amnesty*

Amnesty International heitir á øll um at mótmæla avgerðini hjá Sharia-dómstólinum í Nigeria í málinum um 30 ára gomlu Amina Lawal. Hon er dømd til at verða steinað til deyðis, tí hon hevur fingið eitt barn uttan fyri hjúnarlag.

Amnesty stúrir fyri lagnuni hjá Amina Lawal og fordømir nýtsluna av kropsligari revsing, píning, amputatión og deyðarevsing. Samstundis minnir Amnesty International á, at stjórnin í Nigeria hevur viðtikið og tikið undir við fylgjandi altjóða mannarættindasáttmálum:

ST-sáttmálanum móti píning, ST- seminginum um borgaralig og stjórnmálalig rættindi og ST- sáttmálanum um útihýsing av øllum mismuni móti kvinnum.

Harvið er dómurin í stríð við innanlendis og altjóða lóggávu.

Amnesty savnar inn undirskriftir í fleiri londum – listin kann takast niður á heimasíðuni http://www.amnesty.fo ella fáast við at skriva til chair@amnesty.fo. Til ber eisini at lesa nógv meira um málið á heimasíðuni.

# Marna leggur súgvirørið frá sær

*Jústines Leivsson Eidesgaard*



*Marna til arbeiðis, aftast til høgru*

Í dag er seinasti starvsdagur hjá Marnu Debes Winth-ereig, klinikkassistenti á barnatannarøktini hjá Tórshavnar Kommunu. Hon leggur frá sær eftir drúgvar starvsdag, heili 43 ár, og ongin annar hevur starvast so leingi á Barnatannarøktini. Hon hevur slitið fleiri tannlæknar upp, skrivað í positivari meining.

Vit skrúva tíðina 43 ár aftur, aftur til 1959, tá ein ung gjáarkvinna fór at ganga barnatannlæknanum í Havn til handar. Uppkoladir tanngarðar vóru daglig sjón og tað stóðilla til við tonnunum hjá børnunum. Marna hevur sæð alla menningina fram til í dag, nú hol er rár sjón í einum barnamunni Og tað er ikki so galið at leggja frá sær, tá gongdin hevur verið til tað betra og tannaheilsan hjá børnum er so góð, sum hon er í dag. Og hetta hóast Cola úr Ameriku og bíligir sukurúrdráttir úr ES, serliga herviligir, tá teir eru kókaðir upp til karamel, floyma inn yvir landið og gera barnatannarøktina enn meira neyðuga.

Dagurin verður hátíðarhildin. Starvsfólkið ætlar at gera burtur úr og siga starvsfelaganum farvæl á virðiligan hátt, og hóast illa er statt millum býráðspolitikkararnar akkurát, nógvir eru og ferðast uttanlands, so verður roknað við, at onkur trínur inn á gólvið seinasta starvsdagin hjá Marnu.



# Pínligur loppu-marknaður

**BREKAÐ**
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Leygardagin verður ein loppumarknaður hildin í Sjónleikarhúsinum í Havn. Peningurin sum kemur inn fer óskerdur til ein buss til búfólkini á teimum trimum bústovnunum á Eirargarði í Havn.

Eitt paradoks, ein tvørsøgn. Á Eirargarði búgva fimtan búfólk millum 26 og 72 ár og har eru átta koyristólar. Átta av búfólkunum eru so illa fyri, at tey fáa ikki gingið sjálvi, men eru bundin at einum koyristóli. Men tey hava ongan buss, sum kann koyra tey, tá tey skulu til okkurt. Tey eru bundin at stovnunum.

Starvsfólkini hava greitt fingið at vita frá myndugleikunum, at tey fáa ongan buss. Skulu tey hava ein slíkan, so mugu tey skaffa peningin sjálvi. Tað hava tey roynt, men striltið gongur. Kommunurnar hava latið eina krónu pr. íbúgva og onkur peningarstovnur hevur eisini stuðlað, men aðrir peningastovnar hava ikki játtað stuðul, tí teir meta hetta er ein almenn uppgáva.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Bill Justinussen, landsstýrismanni, sum hevur hetta øki undir sær. Hann var ikki at hitta, men formaðurin í Miðflokkinum, sum skal evna familju og trivnaðarpolitikkin hjá Miðflokkinum, Jenis av Rana, er skelkaður.

- Eg fari beinanvegin at seta meg í samband við Bill. Her má vera talan um onkra skeiva raðfesting. Hetta eru jú smápengar talan er um. Ein bussur kann ikki kosta meira enn nakrar hundrað túsund krónur og búfólkini á Eirargarði hava rætt til at bevega seg eins væl og onnur í samfelagnum, sigur Jenis av Rana.



*Hesi trý arbeiða á Virkni og búgva á Eirargarði.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Niðurgerandi

**Sólgerð Gaard er mamma at eini spastiskari gentu, sum býr á Eirargarði. Hon heldur, at tað er niðurgerandi og mannminkandi, at Eiragarður er noyddur at krúpa til eina og hvørja kommunu í landinum og biðja um pening, so sjúklingarnir kunnu flytast runt í býnum**

**BREKAÐ**
*Ingrid Bjarnastein*

Dóttir Sólgerð Gaard í Oyndafirði er spastikari og býr á Eirargarði.

Sólgerð Gaard heldur tað verða ógvuliga niðurgerandi og mannminkandi við loppumarknaðinum. Hon heldur ikki, at tað kann vera rætt, at ein slíkur stovnur verður noyddur at fara niður á knøini fyri at búfólkini skulu sleppa at flyta seg runt um í býnum.

– Tey, sum búgva á Eirargarði, eru við skerdan lut, og eg vil fegin vita, hvar øll vallyftini eru blivin av, sigur Sólgerð Gaard, sum er mamma at Sjúrðu, sum er 26 ára gomul, og hevur ongantíð dugað at gingið.

– Hesi fólkini eru fangar í teirra egna kroppi, og tey eru 15 fólk, sum mugu biðja um tíð fyri at sleppa út. Øll í Føroyum hava hvør sín bil í dag, og at tey noyðast at bidda um pening fyri at fáa ein buss er skomm.

Og um Sjúrða skal heim eitt vikuskifti, so kostar hetta yvir 1000 krónur. Hetta kemst av, at ein serligur taxa-bilur, sum hevur pláss fyri koyristóli noyðist at koyra Sjúrðu allan vegin inn í Eysturoynna.

Sólgerð Gaard heldur, at myndugleikarnir áttu at hildið seg til síni lyftir, tí tað kann ikki verða rætt, at ein bólkur í samfelagnum verður útsettur fyri so mannminkandi viðurskiftum.





Tú ert millum 13 og 25 ár. Alt annað er líkamikið. Dámar tær 1nú romantiskar tónar, tá ið tit eru 2eini? Ert tú tann seigi, sum einsamallur 3vur í Ormin Langa, ella hin bragdliga, sum altíð skalt 4 nakrar flatar? Setur tú hvørt 5oyra inn á kontu ella keypir tú heldur 6tanda parið av diesel-buksum? Nýforelskaður og í 7. himni, ella bert tú als ikki 8 fyri at vera single? Eisini líkamikið! Fá tær bara eitt av spildur9 +kortunum frá Føroya Sparikassa. Tú kanst velja millum 10! Við egnum nick-navni, sjálvandi ;)

Bílegg títt +kort í Føroya Sparikassa. Eisini um tú hevur eitt frammanundan. Hav eina passmynd av tær sjálvum við. Tú fært nýggju stakfløguna hjá Brandi Enni beinanvegin – ókeypis!

**Plusspakkin:** Í plusspakkanum eru tvær kontur og eitt +kort. Fyrra kontan, +Spar, er bundna sparikontan. Seinna kontan er +Kontan. Hon er brúkskonta við tínum serstaka +korti.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo